Hugskotskapping

# Roykstovan/Faktorhúsini

## Býarbókasavn, kunningarstova og lítil býarpark

Hugskot: Siri Andreasen

Sameina eitt aktivt býarbókasavn við kunningarstovu ella ferðaskrivstovu, og uttanfyri ein lítil býarpark við spæliplássi. Møguliga inndraga glasstovuna ella byggja uppí niðaneftir vestureftir fyri at fáa meiri pláss.

Býarbókasavni skal fevna víða. Borgarar kunnu koma inn at lesa dagsins bløð og keypa sær ein kaffimunn afturvið, barnafamiljur kunnu koma inn við børnunum bæði til at lesa og spæla. Tað kann vera við at hava lesikrók, heingikoyggju, útklæðingarkassa og aðrar leikur, playstation, nintendo e.l. Pláss skal eisini vera fyri lesibólkum og øðrum áhugabólkum at møtast. Tað kunnu vera skeið av ymsum slag, t.d. bindiskeið og tekniskeið. Á loftinum kann skrivstova og goymsla til hesar áhugabólkar at deila ella til privatar ferðamannaskrivstovur at leiga seg inn.

Ferðafólk skulu lættliga kunna finna kunningarstovuna við góðari skelting uttanfyri og innrætting av innbjóðandi útøki. Alment WC kann eisini vera her.

Garðurin skal innrættast til park við góðum atliti til sólargang og lívd, og rúm skulu gerast soleiðis at pláss er bæði fyri børnum at sleppa at spæla og teimum, ið ynskja meir frið. Fleiri uppihaldsøkir skulu vera, ein vakur urtagarður skal gerast og møguleiki er eisini at taka okkurt økið til skúlanæmingar ella børn í stovunum at planta í. Við plantuvalinum skulu atlit takast til árstíðirnar og anga. Betonggarðurin vestureftir kann koma við í Litbrá-projektið, og møguleiki er eisini at planta klatriplantur í støðum við garðin. Betonggarðurin yvir í móti Fylking kann takast burtur og parkeringsøkið víðkast har, og góð atgongd millum Roykstovuna og parkeringsplássið kann skapast. Atkomuviðurskiftið skulu vera fyri øll. Millum núverandi tún og garð kann trappa við rampu gerast, sum eisini er sitipláss. Niðanfyri faktorhúsini skal breið gongubreyt gerast, og innrættast sum innbjóðandi atkomuøkið. Girðing kann setast fyri nakað av gongubreytini fyri trygd.

Spæliplássið kann taka íblástur frá natúrspæliplássum. Ein rusjibani kann gerast út einum stórum røri og leggjast í lendi har halli er nógv. Ein rennistrongur kann gerast frá nýggja parkeringsplássinum og oman í bøin. Ovarlaga kann eitt stórt klatrinet setast upp. Leikur skulu vera til bæði stór og smá børn.

Sí eisini tekningar (havin er bert principielt innrættaðar, men gevur eina hóming av huskotinum):

- Støðumynd
- 3D




Hugskotskapping Roykstovan/Faktorhúsini

| 2M | 4M | 6M | 8M | 10M |
|---|---|---|---|---|

Tvøroyri

| | |
|---|---|
| Snið | SA |
| Teknað | SA |
| Dato | 23.05.18 |
| Mát | 1 : 200 |

Matr. nr.

Støðumynd





Hugskotskapping Roykstovan/Faktorhúsini

| 0M | 0M | 0M | 0M | 0M |
|---|---|---|---|---|

Tvøroyri

| | |
|---|---|
| Snið | SA |
| Teknað | SA |
| Dato | 23.05.18 |
| Mát | |

Matr. nr.

3D